


## Svøríki vil hava Hamrén

Svensk fótbóltssambandið satsar alt upp á at fáa Erik Hamrén (myndin) sum nýggjan landsliðsvenjara hjá Svøríki, hóast núverandi arbeiðsgevari hansara, norska Rosenborg, slett ikki vil av við hann. Nú hevur svenska fótbóltssambandið sett seg beinleiðis í samband við Rosenborg, og sum skilst, er ætlanin at hava fleiri fundir um málið, so finnast skal fram til eina loysn, báðir partar kunnu liva við – um tað yvirhøvur ber til hjá svenskarunum at fáa Hamrén leyskeyptan frá Rosenborg.



Høgni í Stórustovu fær ikki virkað sum forseti í Fótbóltssambandinum, og nú hevur hann vent sær til formenninar í Fótbóltsfeløgunum eftir hjálp, so komast kann víðari við málinum um atgongumerkjasøluna hjá Ísaki Mikladal

Mynd: Álvur Haraldsen

# Høgni við neyðarkalli

**Forsetin í Fótbóltssambandinum, Høgni í Stórustovu, sigur seg ikki fáa virkað sum forseti, tí hann hevur ein meiriluta í starvsnevndini ímóti sær. Tí sendir hann nú eitt neyðarkall út til fótbóltsfeløgini, so tey kunnu hjálpa til við at greiða fløkjuna í ovastu leiðsluni í Fótbóltssambandinum**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Ikki kann sigast annað, enn at tað er eitt rættiliga óvanligt stig, Høgni í Stórustovu hevur tikið, nú hann hevur vent sær til feløgini, tí hann sigur seg ikki fáa virkað sum forseti. Orsøkin er, at hann í málinum um atgongumerkjasøluna hjá Ísaki Mikladal hevur fingið ein meiriluta í starvsnevndini ímóti sær.

– Eingin í starvsnevndini visti av hesum máli. Vit viðgjørdu málið hósdagin og fríggjadagin, og var tað aftur á dagsskrá í gjár (mánadagin, blðm). Tað hevur ikki eydnast mær at fáa fatur á øllum skjølunum í málinum enn, hóast málið er komið undan kavi, av tí ein meiriluti í starvsnevndini stuðlar aðalskrivaranum, og hevur biðið meg geva honum arbeiðsfrið, skrivar Høgni til formenninar í fótbóltsfeløgunum.

– Handfaringin av málinum frá aðalskrivarans síðu, har hann tilvitað hevur dult málið, krógvað skjøl, sum eru send FSF, kann eg sum formaður als ikki góðtaka, og at aðalskrivarin sleppur gott frá, enntá við hjálp frá starvsnevndarlimum, at nokta at lata mær øll skjøl í málinum, er eitt grovt álitisbrot og brot á hansara starvsviðurskifti. Tískil havi eg einki at hava álitið á aðalskrivaranum í í hesum máli, umframt at álitið orsakað av nógvum øðrum málum er slitið upp.

### Fær ikki virkað

Í brævinum sigur Høgni í Stórustovu, at hann ikki kundi ganga undir kravið frá einum meiriluta í starvsnevndini um, at haldast skuldi fram við samstarvinum undir fortreyt av, at hetta málið onga avleiðing skuldi fáa fyri aðalskrivaran. Høgni kravdi, at aðalskrivarin varð frítikin fyri tænastu, meðan málið verður upplýst, men hetta vildi ein meiriluti í starvsnevndini ikki.

– Eg fái ikki, við teimum ábyrgdum og skyldum, eg havi sum formaður í FSF, stýrt felagsskapinum. Tað er ikki samsvar millum tað formliga vald, eg sum formaður havi, og tann veruleika, sum eg dagliga skal virka í. Heilt einfalt ber til at siga, at eg havi alla ábyrgdina, men ikki ræðið at virka samsvarandi skyldum mínum, skrivar Høgni til formenninar, samstundis sum hann vil hava teir at gera av, hvat víðari skal fara fram.

– Tit eru partaeigararnir í FSF, og nú støðan er rættiliga kaotisk við tað, at starvsnevndin er býtt upp í ein meiriluta og ein minniluta, har eg eri í, fái eg ikki virkað sum formaður og røkt ta uppgávu, tit hava valt meg at standa á odda fyri, og sum lógir FSF's áleggja mær, síggi eg ikki annan útveg enn at venda mær til tykkara. Tit hava valt meg sum formann, og av tí at støðan tykist fastlæst, og eg ikki meti, at vit sum starvsnevnd kunnu koma víðari, má eg í fyrsta umfari kunnað tykkum, so tit kunnu fyrihalda tykkum til støðuna.

### Fóru av fundi

Eisini staðfestir Høgni í Stórustovu, at hann sum forseti í Fótbóltssambandinum ikki frammanundan var kunnaður um hetta mál yvirhøvur, men at hann kallaði starvsnevndina inn beinanvegin, so skjótt hann var kunnaður um málið mikudagin í farnu viku. Síðani greiðir hann formonnunum frá, at á triðja fundinum um málið fór starvsnevndin í tvíningar og at tað endaði við, at stóri meirilutin í nevndini fór av fundinum.

Sum skilst er meirilutin í hesum málið Niklas á Líðarenda, Rúni Heinesen, Magnus á Stongum, Karl Vidtfeldt og Niclas Davidsen, meðan Høgni í Stórustovu er í minnilutanum saman við Sveini Tróndarsson.

Málið læsir alt politiskt virksemi í Fótbóltssambandinum fast í løtuni, og nú verður tað so upp til fótbóltsfeløgini at gera av, hvussu farast skal fram. Sjálvur hevur Høgni í Stórustovu vent sær til UEFA og gjørt vart við »rætta samanhangin í málinum«, sum hann málber seg.